Heilsustýrið

Heilsustýrið
Óðinshædd 11, 1. hædd hm.
100 Tórshavn

(+298) 30 90 60
hst@hst.fo
www.hst.fo

6. januar 2026
Mál: 25/31836-2
Viðgjørt: Berit L. Larsen

Hoyringarsvar viðvíkjandi lógaruppskot um yvirtøku av málsøkjunum tvingsil í psykiatri og rúsandi evnum.

Heilsustýrið tekur undir við lógaruppskotinum.

Vit vilja tó viðmerkja, at tað ikki er samsvar ímillum hvat stendur í uppskotinum viðvíkjandi anordning nr. 185 frá 13. marts 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien m.v., sum seinast broytt við anordning nr. 923 frá 26. juni 2023 og javntekstin.

Ì anordninginum undir § 1, nr. 2 stendur fylgjandi: “Í § 4, stk. 5 og 6, § 21a, stk. 1 og stk. 2 og § 22, stk. 2 verður “Sundhedsstyrelsen” broytt til: “Landsstýrisfólkið”.

Og í javntekstinum stendur fylgjandi: “Í § 4, stk. 5 og 6, § 21a, stk. 1 og stk. 2 og § 22, stk. 2 verður “Sundhedsstyrelsen” broytt til: “Heilsustýrið”.

Hettar skal verða eins.

Viðvíkjandi § 22, stk. 2 í anordning nr. 185 frá 13. marts 2009 om ikrafttræden for Færøerne af lov om anvendelse af tvang i psykiatrien m.v., sum seinast broytt við anordning nr. 923 frá 26. juni 2023, áljóðandi ”Psykokirurgisk indgreb må endvidere kun foretages efter forudgående godkendelse fra et lægeråd, der nedsættes af Sundhedsstyrelsen.” Um hettar er nakað sum er galdandi longur?

Viðvíkjandi spurninginum um § 40, um sjúklingar kunnu setast á ”Sikringsafdelingen under retspsykiatrisk afdeling, Region Sjælland ella ein føroyskur mynduleiki skal setast inn, heldur Heilsustýrið, at hettar framhaldandi skal verða í Danmark.

Um Heilsustýrið skal hava hesa uppgávur sum eru nevndar í lógaruppskotinum skal eisini fígging til stovnin fylgja við. Hettar fyri at røkja hesar uppgávur á bestan hótt. Her serliga við denti á váðameting av nýggjum rúsandi evnum men eisini hini umráðini.

Vinaliga

Noomi Gregersen
Stjóri

Heilsustýrið

Heilsustýrið/Faroese Health Authority
Óðinshædd 11, 1. hædd hm
FO-100 Tórshavn
+298233050
Noomi@hst.fo
https://www.hst.fo